# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Føroya Læraraskúli:

## 24 pedagogar fingið prógv

**Fríggjadagin 9. februar varð hátíðarhald á Føroya Læraraskúla í sambandi við at ein flokkur við 24 pedagogum varð útskrivaður av skúlanum**



*Fremra rað f.v.: Bjørghild Arnholdtsdóttir, Marita Bech, Durita Berthelsen, Kristina Dalsgaard, Kinna úr Dímun, Birna Tyril Gunnarsson, Beinta Henriksen, Nomi Høghamar og Joan Jakobsen. Aftara rað f.v.: Marjun í Jákupsstovu, Kristina Jensen, Flora Johannesen, Estrid J. Kristiansen, Elinborg Sámalsdóttir Lervig, Rannvá Klein Mittelstein, Sonja Reinert Norðgerð, Elin Petersen, Leila Hentze Hansen, Rúna Simonsen, Una á Steig, Eyð Svínoy, Nita Sørensen og Guðrun Leo Vang. Eyðbjørg Danielsen vantar á myndini*

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Hetta eru fyrstu næmingarnir, sum hava fingið prógv, síðan Jóannes Hansen tók við sum rektari á Føroya Læraraskúla*

Øssur Mohr, listamálari:

## Listaframsýning á Galleri Sct. Gertrud



*Frá 17. februar til 3. marts 2007 hevur føroyski listamaðurin Øssur Mohr úr Fuglafirði listaframsýning í Galleri Sct Gertrud í Keypmannahavn*

*Mynd: Símun Jóanesarson*

Frá 17. februar til 3. marts 2007 hevur føroyski listamaðurin Øssur Mohr úr Fuglafirði listaframsýning við nýggjum málningum í Galleri Sct Gertrud, Knabrostræde 1A, í Keypmannahavn.

Fernisering verður leygardagin 17. februar kl. 13 – 17, har Stanley Samuelsen undirheldur við gittarspæli.

Opið er: týsdag til fríggjadag kl. 14 - 17.30, og leygardag kl. 11 - 14.

